# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Heldur rektarin á Columbia University, at iranski forsetin hevur okkurt at siga teimum lesandi, so er tað í lagi*

*(George W. Bush)*

# – Tey hava tikið Madeleine!

**Charlotte Pennington ansaði børnum á hotellinum, haðani Madeleine McCann hvarv, og hon var millum tey fyrstu, sum fekk at vita, hvat var hent**

Tann 20 ára gamla Charlotte Pennington hevur verið tigandi higartil, men nú hevur blaðið Daily Mail fingið orð á hana um tað, sum hendi í Portugal tann vanlukkudagin fyrst í mai.

– Tá vit komu út, sóu vit Kate, sum rópti "Tey hava tikið hana, tey hava tikið hana!" Eg stóð beint framman fyri hana stutt frá hurðini á íbúð teirra. Eg stóð tætt hjá henni. Eg veit ikki, um hon segði nakað annað fyrst, men eg hoyrdi hana í hvussu er siga orðini "Tey hava tikið hana", og hon endurtók navnið á Madeleine fleiri ferðir, sigur Charlotte Pennington við Daily Mail.



*– Tey hava tikið Madeleine! Tey hava tikið hana! rópti Kate McCann sambært gentuni, sum ansaði børnum á portugisiska hotellinum*

Hon er sannførd um, at hvørki Kate ella Gerry McCann hava beint fyri Madeleine, men hon hevur eitt sindur ilt við at greiða frá, hvussu Kate kundi vita beinanvegin, at onkur hevði tikið Madeleine. Júst hendan spurningin hevur portugisiska løgreglan lagt stóran dent á, skrivar Daily Mail. Sambært blaðnum hava tey avvarðandi hjá Kate seinni sagt, at hon brúkti ikki orðini "Tey hava tikið hana", men heldur "Madeleine er ikki her". Sambært Charlotte Pannington segði hon bæði, men hon dugir ikki at siga, hví Kate var so skjót at siga, at onkur hevði tikið Madeleine.

– Eg veit ikki. Kanska hevði hon varnast tann dagin, at onkur hevði eygleitt Madeleine, og tí hugsaði hon, at viðkomandi hevði tikið hana.

### Vóru hjá børnunum

Charlotte Pennington sigur, at Kate McCann skalv og sat púra kúrr, tá tað varð greitt, at Madeleine var horvin. Tað hevur hon eisini sagt portugisisku løgregluni, og hon hevur eisini avsannað tíðindini um, at Kate og Gerry McCann lótu genturnar vera einsamallar í íbúðini í seks tímar tann dagin í mai.

– Eg hjálpti teimum at geva børnunum døgurða tann dagin. Tvíburðarnir vóru har, Madeleine var har, og foreldrini vóru har. Ætlanin var, at tey skuldu verða liðug klokkan hálvgum seks, men tey prátaðu nógv og góvu sær góðar stundir, so klokkan bleiv seks, áðrenn tey vóru liðug, sigur tann 20 ára gamla barnagentan, sum sambært Daily Mail er eitt av høvuðsvitnunum á Madeleine-málinum.

# So ber til at sigla í ein útnyrðing




*Kortið hjá evropeiska fylgisveininum Envisat vísir, at farleiðin norður um Kanada er ísfrí*

*Mynd: ESA*

**Fyri fyrstu ferð síðani 1978 er eingin ísur norðan fyri kanadisku strondina, og tí ber til at sigla úr Atlantshavinum í Kyrrahavið tann vegin**

Tað var tann tíð, tá æventýrarar og sjófarar royndu at vita, um tað bar til at sigla úr Atlantshavinum í Kyrrahavið við at fara norður ímillum Grønland og Kanada og síðani vestur við kanadisku norðurstrondini.

Í dag nýtist ongum at leita eftir siglingarleiðini, tí fyri fyrstu ferð vísa fylgisveinamyndir, at tað ber til at sigla tann vegin, tí eingin ísur er við kanadisku norðurstrondina.

Orðini "fyri fyrstu ferð" skulu kanska takast við fyrivarni, men hetta er í hvussu er fyrstu ferð, at fylgisveinarnir hava sent slíkar myndir, síðani teir byrjaðu at avmynda leiðina í 1978.

## STUTT SAGT

### Eingin Arnold

Í sambandi við aðalfundin hjá ST í New York skipaðu stjórnirnar í Danmark, Póllandi, Indonesia og Kenya fyri einum borðhaldi fyri fólki, sum hava verið virkin í arbeiðinum at tálma veðurlagsbroytingunum. Millum tey innbodnu var guvernørurin í Kalifornia, Arnold Schwarzenegger, og hann skuldi sita undir liðini á Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra. Men Arnold kom ikki, og tískil stóð stólur hansara tómur undir borðhaldinum. Millum teirra, sum komu, og sum hildu røðu við borðið, var fyrrverandi amerikanski varaforsetin Al Gore.

### Eingi samkynd í Iran

– Vit hava eingi samkynd í Iran, segði iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad, tá hann helt røðu fyri lesandi á Columbia University í New York í gjár. Forsetin er í USA í sambandi við tann árliga aðalfundin hjá ST. Tað hevur leingi ljóðað, at iransku myndugleikarnir fara illa við samkyndum, og at minst tvey samkynd eru tikin av døgum. Men hesum vísti Mahmoud Ahmadinejad aftur við at siga, at tað eru eingir samkyndir iranar.

### Gomul frukt

Í grøvini hjá tí kenda egyptiska konginum Tutankhamon hava granskarar funnið átta kurvar við ymsum fruktum. Fornfrøðingurin Zahi Hawan, sum hevur staðið fyri rannsóknunum, sigur, at talan er um ymsar drúfruktir, sum eru í óvanliga góðum standi eftir at hava ligið í kongsgrøvini í meiri enn 3.000 ár. Hawan sigur, at fruktirnar stava úr einum øki har suðuri í Egyptalandi. Grøvin hjá Tutankhamon varð funnin Konganna Dali í 1922.